Løgmansskrivstovan
Tinganes,
100 Tórshavn

Tórshavn 14. november 2025

Hoyringarsvar hjá Hagafelag Føroya til Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, prosjektering og útboð)

Eftir at hava gjøgnumgingið hoyringarskjøl í sambandi við lógaruppskot til Suðuroyartunnil hevur Hagafelagið hesar viðmerkingar:

Politiska skipanin eigur at tryggja sær, at avgerðin um tunnilsleið verður tikin á einum enn betri upplýstum grundarlagi. Til tess at tryggja hetta krevst:

- At ein strategisk umhvørvisárinismeting av ávikavist linjuføring 1a og b og 2a og b, við øllum avleiddum verkætlanum fyriliggur, áðrenn avgerð um val av linjuføring verður tikin.
- At jarðfrøðilig frágreiðing fyri linjuføringarnar fyriliggur, áðrenn avgerð um val av linjuføring verður tikin.
- Korttilfar við ítøkiligari staðseting av byggiplássunum við allar tunnilsmunnarnar, íroknað mátfastar tekningar við tvørskurðum og lýsingum av funktiónum á byggiøkjunum. Eisini skal frástøðan til týðandi náttúruøkir verða tilskilað á korttilfari.
- Útrokningar av nøgd av tilfari við føstum og leysum nøgdum, sum verða tiknar úr tunli/tunlum við tilskilan av, hvar grótið ætlandi verður lagt í grótgoymslur.
- Mátfastar tekningar av grótgoymslum og visualisering av landslagi, eftir at tilfarið er tyrvt.
- Mátfastar tekningar, sum neyvt vísa staðsetingar, og hvussu nógv verður tikið av lendinum til infrakervið til tunnilsleiðirnar, harundir til vegkassar, rundkoyringar, tunnilsmunnar o.a.

Hagafelagið leggur seg ikki út í kjakið, hvørt Suðuroyartunnil skal gerast ella ikki.

Hagafelagið leggur dent á, at um/tá ið tunnilin skal gerast, er tað av avgerandi týdningi, at valdar verða linjuføringar og loysnir, sum hava minst árin á náttúruna. Ført verður fram av náttúrukønum og frá Umhvørvisstovuni, í hoyringarskrivi til fyrra lógaruppskot til Suðuroyartunnil[1], at vøtnini í Sandoynni eru serlig í mun til náttúruvirðir og fuglalív - eitt nú økið norðan fyri Djúpadal við Stóravatni og Lítlavatni, har ætlanin er, at linjuføring 1a og b skal vera. Harumframt er Skúvoy Ramsar-oyggj, og linjuføringingarnar fara somuleiðis gjøgnum serlig náttúrulendi í Suðuroynni.

Eitt alternativt uppskot til linjuføring, linjuføring 2a og b, hevur verið frammi, sum av mongum verður mett at hava minni avleiðingar fyri náttúruna enn linjuføringin í lógaruppskotinum, sum er lagt út til hoyring. Hagafelagið hevur ikki fakliga førleikan til at áseta avleiðingarnar av alternativu linjuføringini, men vil staðiliga heita á landsstýri og løgting um at kanna hesa loysn

[1] Hoyringarsvar frá Umhvørvisstovuni dagfest 13. desember 2024 – LM-072/2024

betri, áðrenn endalig linjuføring verður vald. Tí tá ið linjuføring er vald, og nógvar milliónir eru nýttar til projektering, vendist ikki aftur.

Náttúran er ikki okkara ogn. Hon er bert til láns tað tíðarskeiðið, vit dvølja her. Vit eru bert eitt ættarlið av óteljandi farnum og komandi ættarliðum. Tí er tað okkara skylda at verja og varðveita náttúruna við øllum hennara djóralívi, planturíkidømi og lendiseyðkennum soleiðis, at hon óskalað kann latast víðari til okkara eftirkomarar.

Vinarliga

Hagafelag Føroya